gult14 cyan14 magenta14 svart14



# FCK spennir bogan høgt



*Enn er ikki greitt hvar Jákup Mikkelsen skal spæla næsta kappingarár*

**Teir leita framvegis eftir nýggjum málverja, og einki bendir á, at teir hava áhuga í at knýta Jákup Mikkelsen at felagnum**

Felagið hjá Toda Jónsson liggur ikki á løtu síðuni. Teir skulu í august undir royndina at koma ígjøgnum tronga portrið til europeisku meistarakappingina. Ta uppgávuna styrkja teir um liðið til, og tá størstu kappingarneytarnir samstundis hava selt nakrar av vandamiklastu spælarunum, so verður FCK mett at vera størri favorittur at vinna DM komandi ár, enn teir vóru síðsta kappingarár.

Í fyrradagin høvdu teir pressufund. Tað varð roknað við, at felagið fór at almannakunngera, hvør skal verja málið hjá teimum komandi ár, men tað var ikki hetta, sum pressufundurin snúði seg um. Í staðin varð boðað frá, at FCK hevur keypt Morten Bisgaard úr italska felagnum Udinese Calcio. Tað er júst til hetta felagið, at meistaravenjarin hjá FCK, Roy Hodgson, fór fyri tveimum vikum síðani.

Einki er upplýst um keypsprísin fyri nýggja spælaran hjá FCK, men danskir fjølmiðlar gita, at italska felagið kanska hevur verið eitt sindur lagaligt at samráðast við, tí teir vóru so ófólkaligir at stinga av við FCK venjaranum.

Morten Bisgaard er 27 ára gamal. Hann hevur spælt átta a landsdystir fyri Danmark, og áðrenn hann í 1998 varð seldur til Italia, spældi hann í OB. Hann er miðvallari, og nú hevur FCK keypt tríggjar nýggjar miðvallarar, síðani teir vunnu DM. Hinir báðir eru Thomas Røll, sum er komin úr Silkeborg, og Carsten Fredgaard, sum er keyptur heim úr Bretlandi.

Í donsku fjølmiðlunum verður mett um, hvørjir spælarar nú fara at kenna tað uppaftur truplari at koma á liðið. Millum hesar verða nevndir Christian Lønstrup, Thomas Thorninger og Donatas. Sáttmálaskeiðið hjá Piotr Haren var úti fyrr í summar. Nú er hann arbeiðsleysur fótbóltsspælari.

## Málverjin

Donsku fjølmiðlarnir høvdu roknað við, at tíðindafundurin hjá FCK hósdagin fór at snúgva seg um, hvør skal vera málverji hjá teimum.

Leiðslan í felagnum hevði einki nýtt um málverjuspurningin uttan, at teir arbeiða við spurninginum, og at teir vóna, at ein nýggjur málverji verður tøkur fyrsta dagin. Tað hevur skund at fáa eina loysn. Thomas Myhrre er farin úr felagnum, ungi Rune Pedersen hevur verið skaddur og er júst farin at venja aftur, og tað ljóðar, at Michael Stensgaard er um rerppið enn eina ferð at gerast fótbóltsinvalid. Í síni tíð noyddist at hann at gevast í Liverpool, tí akslaskaði plágaði. Eftir hvíld í tvey ár fór hann so smátt undir aftur venjingarnar í FCK, men nú hava trupulleikar við rygginum hildið 26 ára gamla málverjanum burturi frá fótbólti síðani í september í fjør. Møguliga skal hann leggjast undir skurð, og tað verður hildið at vera stórt sannlíki fyri, at Stensgaard ongantíð aftur verður førur fyri at spæla fótbólt á høgum støði.

Tíðindini, sum onkur fjølmiðil fyrr í vikuni bar um, at FCK umhugsaði at keypa pólverska málverjan hjá Viborg fyri 14 milliónir krónur verða ikki mett at hava við veruleikan at gera. Víst verður á, at FCK ikki vildi brúka tólv milliónir upp á Thomas Myhre. So er rættuliga lítið sannlíkt, at teir vilja brúka fjúrtan milliónir upp á ein pólverja, sum neyvan er betri málverji enn norðmaðurin.

## Jákup bíðar

Í fyrradagin ljóðaði, at Jákup Mikkelsen var farin til Onglands og Skotlands at royndarvenja. Einki var í hesum tíðindunum. Jákup Mikkelsen er framvegis í Haslev.

Tá vit tosaðu við Jákup Mikkelsen, var eingin avgerð tikin um, hvar hann fer at spæla í komandi kappingarári, men nú verður tað ivaleyst heilt skjótt, at ein avgerð verður tikin. Danskir fjølmiðlar tóku í fyrradagin uppaftur, at Jákup hevur verið roknaður fyri at vera annar av møguligu málverjunum í FCK – pólverski Viborg málverjin varð sagdur at vera hin – men tað man vera lítið, sum bendir á, at nýggi FCK málverjin er hugaður at knýta Jákup afturat felagnum. Annars hevði hann longu havt latið felagið gera tað, tí síðani 1. juli hevur Jákup ikki verið bundin at nøkrum felagi.

# Dreymurin hjá Popczynski gerst ikki veruleiki

**VB venjarin er so mikið skaddur, at hann verður ikki førur fyri at spæla í Europa Cup dystinum mikukvøldið**

GÍ og B36 eru nú so mikið langt frammanfyri, at tað er veruleikafjart at rokna við møguleikanum at røkka teimum. Tí stendur stríðið um at vinna bronsuplássið.

Tað heldur VB venjarin, Krzysztof Popczynski, sum bæði ásannar, at tað verður trupult hjá hansara monnum í Miðvági í dag, og at einki annað nyttar hjá VB enn at vinna øll stigini.

Allir VB spælararnir, sum vóru í Gundadali síðsta sunnudag, eru tøkir – uttan spælandi venjarin. Hann er so mikið illa plágaður av vøddaskaða, at tað er ikki hugsningur um hjá honum at spæla í dag.

Dysturin í Miðvági er framskundaður, tí VB mikudagin í komandi viku skal royna seg í undandysti til Europa Cup fyri meistarar.

– Eg havi altíð droymt um at sleppa at royna meg í hesari kappingini. Eg havi spælt í UEFA Cup fyri Krakow í Póllandi, men eg havi ongantíð roynt meg í meistarakappingini. Tað vildi eg fegin, men eg eri so mikið skaddur, at tað, tíverri, ikki er nakar møguleiki fyri tí, staðfestir ein sera harmur VB venjari, sum harvið hevur sett seg sjálvan á beinkin í bæði landskappingardystuinum í Miðvági seinnapartin í dag og í Europa Cup dystinum mikukvøldið.

## Nógv aftanfyri

Í Vágum er hugurin at venja ikki so galin, men uppgávan er ógvuliga stór. Venjingarstøðan hevur ikki verið góð, men tað hevði kenst sera hugaligt, um eitt stig fekst burturúr ímóti VB. Tað hevði ivaleyst skumpað undir fyrireikingarnar til tey síðstu átta umførini, halda teir í Vágum.

Tað er sera ivasamt um miðvallarin Jón Nielsen verður førur fyri at spæla. Hann hevur trupulleikar við fótliðnum. Tað er eisini ivasamt, hvussu tað verður við verjuspælaranum Jack Johansen. Hann hevur trupulleikar við knænum.

Dysturin í Miðvági verður í dag klokkan 15.

gult15 cyan15 magenta15 svart15



# Stórt mannfall á Sandi



*Tað er ivasamt, um Eli Hentze verður klárur at spæla leygardagin*

**EB/Streymur er manningarliga væl fyri, meðan gestirnir av Sandi hava fleiri veteranar, sum ikki eru í venjing, við norður til Eiðis**

Ein tann mest spennandi dysturin í 10. umfarinum er tann á Mølini á Eiði. EB/Streymur, sum av álvara hevur bitið frá sær í fleiri av síðstu dystunum, fær vitjan av B71.

Um EB/Streymur vinnr, so leggja teir rættuliga sjógv ímillum seg og B71. Spurningurin er so, hvussu tað fer at gangast hjá EB/Streymi, nú tað verða teir, sum skulu mynda spælið. Støðan líkist ikki einki henni hjá føroyska landsliðnum, sum ofta stendur seg væl, tá trýstið er stórt og møguleiki er fyri at royna snarálop, meðan tað ikki altíð gongst so væl, tá mótstøðuliðið á pappírinum ikki er so sterkt.

Í EB/Streymi eru teir væl fyri. Allir spælararnir eru tøkir, og viljin tykist ikki skorta at geva lagnum á stevnuni, sum er í Hvalvík, eitt kvink rætta vegin.

## Nógvir burturi

Sandoyingar hava bara vunnið eina ferð í ár. Tað var, tá EB/Streymur í fyrsta umfarinum var á Sandi. Úrslitið var 1–0.

Fyritreytirnar hjá B71 eru vánaligar hesa ferð. Stórtapið ímóti GÍ kostaði nógv. Jón Brekku og Bjørn Thorsteinsson sóu reyða kortið og eru tískil leikbannaðir. Jógvan Jón Petersen sá gult og er leikbannaður, Peter Ritter fær ikki spælt orsaka av persónligum umstøðum, og Svenning W. Hansen fær ikki spælt, tí hann er plágaður av vøddaskaða.

Julian Floresco kom ikki á vøllin eftir steðgin, tá GÍ vitjaði. Hann er skaddur í fótliðnum, og tað er sera ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla. Kári Nielsen gongur við brákaðum beini í fótinum, og hann fær ikki spælt. Eli Hentse var uttanfyri seinast, tí hann hevur trupulleikar við fótliðnum. Á Sandi vóna teir, at hann verður førur fyri at spæla í kvøld.

Á Sandi eru teir vísir í, at teir fáa mannað lið í kvøld, men teir fara at hava onkrar spælarar við til Eiðis, sum ikki hava vant nakað serligt. Veteranar sum Páll á Reynatúgvu og Ib Mohr Olsen kunnu koma upp á tal.

# Kapppróður á Sundalagsstevnu



**Bátarnir koma at liggja í hesi nummarrøð til kappróðurin á Sundalagsstevnu í Hvalvík leygardagin 7. juli**

**5-mannafør, dreingir**
1 Drekin
2 Havfrúgvin
3 Frúgvin
4 Tjaldrið
5 Sílið
6 Fípan Fagra
7 Blikur
8 Erla Kongsdóttir
9 Beinta

**6-mannafør, kvinnur**
1 Snopprikkur
2 Hvessingur
3 Fortuna
4 Leirvíkingur
5 Jarnbardur
6 Páll Fangi
7 Sølmundur
8 Víkingur
9 Gongurólvur
10 Lómur

**5-mannafør, gentur**
1 Báran
2 Dúgvan
3 Frúgvin
4 Havfrúgvin
5 Ørnin
6 Tjaldrið
7 Sílið
8 Fípan Fagra
9 Blikur
10 Drekin
11 Hvassi
12 Firvaldur
13 Beinta
14 Snípan

**6-mannafør, menn**
1 Lómur
2 Kollfirðingur
3 Snopprikkur
4 Gongurólvur
5 Hvessingur
6 Sølmundur
7 Strálan
8 Riddarin
9 Fortuna
10 Páll Fangi
11 Fuglfirðingur
12 Hósvíkingur
13 Víkingur

**8-mannafør**
1 Ørvur
2 Knørrur
3 Nevið Reyða
4 Kvívíkingur
5 Argjabáturin
6 Heiðabáturin

**10-mannafør**
1 Suðuroyingur
2 Vestmenningur
3 Eysturoyingur
4 Havnarbáturin
5 Nólsoyingurin
6 Skálabáturin

# Ovurfegin timburmaður

**Toppskjúttin hjá Silkeborg er seldur til Bolton, har lønin verður fýra milliónir um árið í fýra ár, men tað er lítið afturímóti lønini hjá Sol Campbell**

Aftur og aftur hoyrist, at fótbóltsspælarar í skandinavisku londunum droyma um og vóna, at teir fara at verða seldir til Onglands, tí har eru tær stóru pengaupphæddirnar at vinna.

Mikudagin varð hetta enn eina ferð staðfest. Silkeborg álopsmaðurin Henrik Petersen – hann verður altíð nevndur Tømreren – varð seldur til Bolton, sum er eitt av nýggju feløgunum í bestu deildini í Onglandi. Donsku fjølmiðlarnir vita at siga, at nú er Henrik verdens gladeste tømrer (hann hevur ongantíð arbeitt sum timburmaður!), sum teir taka til.

Orsøkin til gleðina er, at sáttmálin veitir trygd fyri einari inntøku upp á fýra milliónir um árið næstu fýra árini. Tað er ikki so galið, tá havt verður í huga, at skattatrýstið í Onglandi liggur um 25 prosent. 27 ára gamli Henrik Petersen kom fyrstu ferð á danska landsliðið, tá Morten Olsen og hansara menn fyri einum lítlum ári síðani vunnu 2–0 á Tórsvølli.

Frammanundan eru tveir danskir spælarar í felagnum – Bo Hansen, sum áður hevur spælt í Brøndby, og Per Frandsen, sum áður hevur spælt í FCK.

Tað hevur eisini ljóðað, at Bolton er áhugað at keypa Thomas Myhre, sum inntil fyri stuttum var útleigaður frá Everton og til FCK, har hann var málverji, tá teir vunnu DM. Tað sigst, at Bolton vil tosa um at keypa málverjan fyri tær fjúrtan milliónirnar, sum FCK ikki hevur viljað rindað fyri ein málverja. Sjálvur sigur málverjin við norska blaðið VG, at hann bíðar í spenningi, og at tað er næstan líka mikið, hvat felag talan er um. Einki er so forargiligt sum at sita uttanfyri og ikki vita, um ella nær møguleiki verður at sleppa aftur á vøllin, sigur Thomas Myhre.

## Óhugnaligar upphæddir

Suðuri í Europa eru feløgini farin undir fyrireikingarnar til eitt nýtt kappingarár. Nógvir spælarar skifta felag, og viðhvørt eru upphæddirnar, sum fara av einari konto og á eina aðra, heilt óhugnaligar – ikki minst í Italia og Spania. Men í Onglandi duga teir eisini at brúka pengar upp á fótbóltsspælarar.

Í vikuni gjørdist tað greitt, at tað verður í Arsenal, at 27 ára gamli verjuspælarin Sol Campbell skal spæla. Arsenal vann kappbjóðingina um landsliðsmannin. Hini feløgini, sum vístu stóran áhuga, søgdust at vera Barcelona og Bayern München. Sol Campbell segði sjálvur, at hann kundi havt fingið størri upphæddir frá hesum feløgunum, enn hann fekk bjóða í Arsenal, men hann valdi Arsenal, tí so verður bústaðurin framvegis London. Og so hevur tað eisini týdning, at landsliðsvenjarin, Sven–Göran Eriksson, ivaleyst fer at síggja fleiri dystir og harvið spælarar í Onglandi, enn hann fer at hyggja at aðra staðni í Europa.

Sol Campbell fær 1,5 milliónir krónur frá Arsenal – um vikuna! Og tað er ikki nóg mikið við tí. Fótbóltsspælarar hava vanliga umboðsmenn, tá teir eru í sáttmálasamráðingum. Umboðsmaðurin hjá Campbell er ein vinmaður hjá honum, sum er mest kendur fyri at duga at spæla borðtennis. Hann fær ein sjatt frá Arsenal fyri at hava syrgt fyri sáttmálanum. Ómakslønin er 35 milliónir krónur!

Higartil hevur Sol Campbell spælt við Totthenham. Tað er óhoyrt, at spælarar skifta ímillum hesi bæði feløgini, Tottenham og Arsenal, sum eru erkafíggindar í London. Men har var einki at gera, tí Tottenham segði seg ikki vilja rinda meiri enn eina millión krónur um vikuna!

# Dystir um vikuskiftið

| | | |
|---|---|---|
| 6. juli | GÍ–KÍ | Páll Augustinussen |
| 7. juli | B36–NSÍ | Suni Johansen |
| 7. juli | EB/S–B71 | Lassin Isaksen |
| 8. juli | B68–HB | Birgir Sondum |
| 8. juli | FSV–VB | Oddmar Andreasen |